Óstøðugt

2. deild: Higartil hava avrikini hjá næstbesta HB liðnum verið sera óstøðug

JÁKUP MØRK

EB/Streymur-HB 3-1 (1-0)

Ofta kemur fyri, at úrslitini í byrjanini av kappingarárinum eru sera óstøðug, og higartil er líkt til, at 2. deildarliðið hjá HB roynir at fylgja júst hesi forskrift.

Fyrsta umfarið vóru teir greitt við undirlutan í Runavík, meðan teir fyri viku síðani vunnu stórsigur á hvalbingum.

Hesu ferð vóru teir aftur við undirlutan, og sum skilst á lagnum, so skulu havnarmenninir prísa sær lukkuligt fyri, at teir á felagsliðnum ikki í størri mun gjørdu sær dælt av vánaliga verjuspælinum hjá havnarmonnum.

Evnaríkir unglingar

Talan gjørdist bara um trý mál, sum Halldórur Joensen, Andreas Dahl og Dánjal Magnussen skutu, men skuldi úrslitið staðið mát við møguleikarnar, kundi talan lættliga verið um tvísiffrað tap frættist frá dystinum.

Sjálvir hildu HB leikararnir, at avrik teirra hevði verið út av lagi vánaligt, og at teir í øllum førum høvdu fingið okkurt at hugsað um til komandi vikuskiftið.

Bergur Magnussen, sum venur liðið hjá EB/Streymi, læt hinvegin hampuliga væl at.

Hann helt tó, at nógvir lutir í spælinum kunnu betrast, men hinvegin hava teir tó fingið seks stig av níggju møguligum, so enn fylgja teir við oddaliðunum.

Uppgávan hjá Bergi er fyrst og fremst at byggja eit nýtt lið upp. Nógvir av teimum leikarum, sum undanfarnu ár hava myndað liðið, eru antin givnir, ella eru ikki tøkur av øðrum orsøkum, og higartil í kappingin hava fleiri blaðungir leikarar tí fingið høvið at royna seg.

Nýggju menninir hava eisini longu prógvað, at fótbóltsevnini eru á eini leið, men hinvegin er ofta trupulleiki við yngru leikarum, at avrik teirra eru ov óstøðug.

Leygardagin tóktust leikararnir tó ikki at hava henda trupulleika, og í øllum førum var hann nógv størri hjá teimum 11, sum stillaðu upp hinumegin miðlinjuna.

Ikki topplið

HB mundi helst vera fyrsta felagið her heima, sum megnaði at hava topplið í bæði fyrstu og aðru deild, men enn hava teir ikki á nakran hátt prógvað, at hetta er tað teir ætla í ár.

Avrikini hava sum nevnt verið sera óstøðug, og hetta kundi bent á, at leikararnir ikki leggja nakað serligt í, hvussu leikur fer.

Sostatt verður neyvan talan um nakað oddastríð hjá teimum í ár, men hinvegin kann neyvan roknast við, at teir verða millum niðastu liðini. Á liðnum eru fleiri leikarar, við drúgvum royndum, umframt ungar leikarar, sum banka upp á 1. deildardyrnar, so nógv niðanfyri miðjuna fara teir nokk ikki at vera staddir, tá avtornar.

EB/Streymur-HB 3-1 (1-0)

1-0 Halldórur Joensen
2-0 Andreas Dahl
2-1 Hans Jørgen Durhuus
3-1 Dánjal Magnussen

Hóast málleysa javnleikin, so vóru málmøguleikar at síggja í Sarpisgerði sunnudagin. Á myndini síggjast gøtumenn og Klaksvíkingar eygleiða bóltin, men eisini hesu ferð var kósin skeiv

Mynd: JH

Klaksvíkingar vóru vongskerdir

1. deild: Toppliðini í fjør vístu ikki avrik, sum bendu á, at KÍ og GÍ í ár skulu kappast um FM heitið

GÍ-KÍ 0-0 (0-0)

Fótbóltslíkindini kunnu ikki verða betri, enn tey vóru í Sarpigerði sunnudagin. Men spælið var ikki tað, sum tað kanska hevði verið vónað, tá hugsað verður um, at talan var um tey bæði liðini, sum í fjør vunnu gull og silvur.

Hvørki GÍ ella KÍ megnaðu at fáa flótandi spæl at hanga saman. Ferðin var ikki høg, og miseydnaðu temjingarnar og sendingarnar vóru alt ov nógvar.

Hjá GÍ var miðvøllurin mannaður við so royndum monnum sum Jarnskor brøðrunum Paula og Magna og Jóan Peturi Olsen. Johan Nielsen segði í leikskránni, at hann roknaði uppgávuna sera torføra, tí klaksvíkingarnir vóru svangir. Hetta mundi vera orsøkin til, at Pól Ennigarð (rúgvaði væl upp á høgra vongverja) var komin upp úr Danmark at hjálpa til.

At útlagni maðurin var við hevði við sær, at Áslakur R. Petersen, sum hevur verið fastur maður higartil, var á beinkinum, sjálvt um Súni Olsen restaði í hinum borðinum. Henning Jarnskor loysti skadda systirsonin av á vongverjanum, og tað var ivaleyst ein av orsøkunum til, at lítil tyngd var í álopspartinum hjá GÍ.

Lítil tyngd í álopinum

GÍ miðvøllurin og síðuspælararnir høvdu fyri tað mesta betri tak á bóltinum, enn klaksvíkingarnir, men tað gekk illa at spæla seg til upplagdar møguleikar. Óli Hansen var so at siga blindur ferðamaður mitt fyri, Helgi R. Petersen tóktist ikki at stórtrívast í vinstru, og og tað var sjáldan, at Rúni Justinussen megnaði at koma til baklinjuna í høgru.

At tað var lítil tyngd í fremstu ketuni hjá GÍ var staðfest av, at tað vóru miðvallarar og verjuspælarar, sum høvdu størstu møguleikarnar at gera mál. Um Jóan Petur Olsen hevði fingið bóltin í kassan í staðin fyri úr fimm metrum at senda í tvørtræið, eftir at langt innkast úr høgru var komið innfyri, hevði uppgerðin ivaleyst myndast øðrvísi.

GÍ hevði bara ein annan upplagdan møguleika. Tað restaðu tjúgu minuttir, tá Bartal Eliasen drønstútaði frísparksinnlegg frá Paula Jarnskor í tvørtræið. Bólturin støkk út aftur í málteigin, og í seinnu atløgu bjargaði Jan Andreasen á strikuni aftanfyri Gunnar á Steig, sum fyri tað mesta hevði gott tak á nógvu høgu bóltunum,ið komu í brotsteigin.

Kristian eyðsýndur

Tað var eyðsýnt, at tað nervar klaksvíkingar, at tað í ár ikki hevur gingið, sum teir høvdu vónað og kanska roknað við. Nógvir av spælarunum vóru langt frá tí, sum teir áður hava vístur, at teir kunnu, og av teimum ellivu vóru tað bara tríggir, sum vóru sannførandi. Teir vóru miðverjarnir Andrzej Pacek, sum tykist vera komin fyri seg eftir brotið í kjálkanum, Jan Andreasen, sum var sera tryggur, og so blaðungi Kristian á Lakjuni.

Serliga 16 ára gamli unglingin stóð sterkur í myndini. Flestu av viðspælarunum hjá Kristiani høvdu sera ilt við at standa seg í nærdystunum – bæði í luftini og á jørðini – men Kristian vísti sera høgt støði. Hann var snildur við bóltinum, hann vann nógvir nærdystir, og tað var sera sjáldsamt, at ein so ungur og óroyndur spælari var førur fyri at fylla so nógv á miðvøllinum.

Vongskerdir

Klaksvíkingar vóru í løtum undir stórum trýsti, men av tí at GÍ ikki megnaði at skora, lúrdi møguleikin fyri útimáli alla tíðina. Ove Nysted, sum vann nógvar luftdystir, var onkra ferðina nær við, og tað var Heðin á Lakjuni eisini.

Men tað var ikki stór tyngd í álopspartinum hjá KÍ. Teir vóru ov fáir í brotsteiginum, og innleggini vóru ov fá. Í fjør vóru Harley Bertholdsen og John Ryan í borðunum, men hyørgin teirra var við móti GÍ. John er skaddur og ikki so væl fyri, sum hann var í fjør, og sunnudagin var Harley Bertholdsen sjúkur. Símun Waag Høgnesen og Niclas Niclassen vóru á vongverjunum. Teir fyltu væl upp í verjupartinum, men teir tóktust ikki at hava nakran serligan álopssetning.

Tomislav Sivic spenti álopsbogan síðstu løtuna, samstundis sum hann roynndi at binda um verjupartin. Aftaru menninir hildu seg afturí á vøllinum, og venjarin sjálvur og Hjalgrím Elttør komu í álopið, sum síðstu løtuna var mannað við fýra monnum. Samanspælið hekk betur saman, enn tað hevði gjørt, men einki mál spurdist burturúr.

JH

GÍ:
Sunvard Joensen – Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Martin Thomsen, Henning Jarnskor – Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Pauli Jarnskor – Rúni Justinussen, Óli Hansen, Helgi R. Petersen

KÍ:
Gunnar á Steig – Símun Waag Høgnesen, Andrzej Pazek, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Kristian á Lakjuni, Jan Joensen, Rógvi Jacobsen – Arnold Joensen, Ove Nysted, Heðin á Lakjuni

Herfølge trýstir Brøndby

Superligan: Jákup Mikkelsen var óheppin at gera sjálvmál, tá hann og Herfølge hildu kósina móti DM

Verða Jákup Mikkelsen og teir meistarar, verður hetta helst mest óvæntaða endastøðan í danskari fótbóltssøgu

Annan sunnudag verður tað greitt, hvør kann kalla seg fyrsti danski meistarin í fótbólti eftir at nítjan hundrað er skift út við tvey túsund.

Jákup Mikkelsen og Herfølge eru framvegis á odda, og eftir at teir sunnudagin vunnu 2–1 í Esbjerg, eru tey alt fleiri, sum rokna við, at meistaraskapurin í ár verður vunnin av Herfølge. Um hetta verður soleiðis, so verður talan um mest óvæntaðu endastøðuna nakrantíð í donskum fótbólti, verður sagt.

Hóast Esbjerg er botnlið og ivaleyst ikki hórar undan í stríðnum fyri at sleppa undan niðurflyting, so var tað sumt, ið bendi á, at uppgávan hjá Herfølge fór at verða torfør. Mitt í síðstu viku var Esbjerg, sum í síðsta heimadystinum undan vitjanini hjá Herfølge hevði vunnið 2–0 á Brøndby, í Lyngby, har teir vunnu 6–4.

Og spurningurin er, hvussu tað hevði lagað seg, um Esbjerg hevði komið á odda móti Herfølge. Beinanvegin høvdu teir góða skotroynd, men Jákup Mikkelsen hevði tað heppnið, sum oddalið ofta verða sødd at hava. Bólturin small í stólpan og fór út til málspark, og so var tað, at Herfølge tók valdið á vøllinum og skoraði tvey mál.

Tað fyrra fingu teir tá tíggju minuttir vóru farnir. Málskjútti var Jens Madsen, sum fylgdi upp í vinstru og sendi innleggið ella skotroyndina, sum var komin úr hinum borðinum í kassan.

Tá Jesper Falck tíggju minuttir seinni økti til 2–0, var tað eftir fríspark. Herfølge átti at havt økt uppaftur meiri um leiðsluna. Teir spældu væl, og teir høvdu nógvar møguleikar fyrsta tíman, men teir fingu ikki fleiri mál.

Esbjerg minkaði um munin miðskeiðis í 2. hálvleiki. Jákup Mikkelsen vard skrásettur at hava gjørt sjálvmál. Tað ljóðar kanska eitt sindur undarligt, tí tað kemur ofta fyri, at málverjar eru teir síðstu, sum nerta bóltinum, áðrenn hann fer um strikuna, men hesa ferð var talan um eitt veruligt sjálvmál. Tá Jákup skuldi boksa frísparksinnlegg úr høgru burtur, rakti hann bóltin soleiðis, at hann sigldi í málið.

– Eg helt, at eg boksaði bóltin út til hornaspark, men tað fór hann altso ikki, staðfesti Jákup Mikkelsen aftaná. Sjálvandi var hann fegin um, at sjálvmálið ikki hevði havt við sær, at Herfølge misti nakað stig.

Eftir málið tóktust teir á heimaliðnum at trúgva meiri uppá, at tað kundi bera til at fáa eitt mál afturat, men Jákup Mikkelsen vardi øllum skotroyndunum.

Okkurt slag av málmi

Í gjárkvøldið var Brøndby í Silkeborg. At Herfølge vann legði undan dystinum í gjárkvøldið eitt stórt trýst á favorittarnar til DM úr Brøndby.

Herfølge hevur tríggjar dystir eftir at spæla – tveir á heimavølli og ein á útivølli. Sunnudagin fáa teir vitjan av OB, mikukvøldið í komandi viku skulu teir spæla torføra útidystin í Silkeborg, og annan sunnudag koma Todi Jónsson og FCK til Herfølge.

– Nú eri eg 90 prosent vísur í, at vit fara at fáa okkurt slag av heiðurskrónum, og harvið hava vit meiri enn rokkið málið, sum vit høvdu sett okkum undan kappingarbyrjan og eisini málið, sum vit settu okkum eftir vetrarsteðgin. Eg dugi ikki at siga enn, hvat slag av heiðursmerkjum vit fara at fáa, segði Herfølge venjarin, John Faxe Jensen, sum ikki tykist hava nakað ímóti, at undirspæla leiklutin hjá Herfølge.

Nýklassikarin

Todi Jónsson hevði frí í vikuskiftinum, men komandi vikuskifti kunnu hann og hinir í FCK vera við til at hjálpa Jákupi Mikkelsen og Herfølge nærri meistaraskapinum. Sjálvandi fer tað tá at verða hildið eitt sera vakið eyga við gongdini heimadystinum hjá Herfølge móti OB.

Men ivaleyst verður tað soleiðis, at stóri áhugin hjá pressuni – bæði í hesi vikuni og í vikuskiftinum – fer at vera vendur móti einari nýggjari útgávu av nýklassikaranum í donskum fótbólti. FCK skal spæla í Brøndby, og tey seinnu árini hevur einki í donsku superliguni komið í nánd av áhuganum fyri hesum uppgerðunum.

Stórfeløg í tungum sjógvi

At tíðirnar broytast er sjón fyri søgn í donskum fótbólti. Fyri einari fjórðings øld síðani var FCK ikki til, og Brøndby spældi seriufótbólt. Tá taldust AGF, Vejle og Esbjerg millum tey stóru og nógv vinnandi feløgini í Danmark.

Nú stendur ikki so væl til í jysku stórfeløgunum. Øll eru tey í botninum í superliguni. Felagið hjá Óla Johannesen hevði frívikuskifti, men hóast tað, so mundu teir draga andan eitt sindur lættari. Esbjerg og Vejle vóru undan vikuskiftinum undir niðurflytingarstrikuni, og tað eru tey framvegis. Vejle tapti ikki minni enn 7–1 móti AaB, og 6.721 áskoðarar sóu Esbjerg tapa móti Herfølge.

Nú verður mest sum tikið fyri givið, at hesi bæði søguligu feløgini ikki verða í superliguni eftir summarfrítíðina. Hesin veruleikin harmar nógv.

Viborg var inntil fyri stuttum við í stríðnum um DM, men nú er luftin farin úr teimum. Teir vitjaðu AB, sum tykist hava fingið luftina aftur, eftir at teir hava givið Ole Mørch sekkin. AB vann 6–0.

OB er eitt annað av stóru feløgunum í superliguni, sum ikki hevur staðið seg væl. Hesa ferð taptu teir 3–1 á heimavølli móti Lyngby, men nú er vandin burtur fyri, at OB skal flyta niður.

jh

Sunnudagin vann Kongsvinger 3–0 á útivølli móti Sandefjord. Kongsvinger hevur tólv stig, og teir eru á næstfremsta plássinum.

JH

Julian besti maður á vølli

Norskur fótbóltur: Sogndal vann stórsigur, men hesa ferð gjørdi Kurt Mørkøre einki mál

Glið tykist vera komið á málskjótingina og harvið vøksturin í stigatali hjá føroyska felagnum í næstbestu norsku deildini.

Sunnukvøldið hevði Sogndal vitjan av Tromsdalen, og teir 851 áskoðararnir kundu staðfesta, at eingin ivi var um, hvør var omaná, og hvør lá undir.

Sogndal var á oddda 2–0 í steðginum. Teir vunnu 6–0, og harvið vunnu teir fyri aðru ferð á rað.

Bæði Julian Johnsson og Kurt Mørkøre vóru á heimaliðnum, og sambært norskum fjølmiðlum stóð serliga Julian sterkur í myndini. Hann var allar 90 minuttirnar á miðvøllinum, og fyri avrikið fekk hann í stóra norska dagblaðnum Verdens Gang eitt seks tal. Julian var tann einasti av teimum 22 spælarunum, sum fekk so gott ummæli.

Julian krýndi góða avrikið við at skora sítt fyrsta mál í landskappingini í ár. Tað var í 64. minutti, tá hann stútaði innlegg í málið til 4–0.

Kurt Mørkøre var á liðnum teir fyrstu 81 minuttirnar. Hesa ferð eydnaðist tað ikki álopsmanninum at skora. Í VG fekk Kurt eitt fýra tal, og tað var sama ummæli, sum nógvir av liðfeløgunum fingu. Kurt Mørkøre sá gula kortið nakað frammanundan, at hann var skiftur út.

Sogndal er á sætta plássi. Stórsigurin sunnudagin styrkti um málmunin sum nú er 15–9.

Sum sagt var Julian kosin besti maður á vølli sunnukvøldið. Og eingin ivi man vera um, at føroyski miðvallarin komandi sunnudag fer at leggja alt tað í, sum hann megnar – og kanska meiri afturat! Sunnudagin skal Sogndal spæla á útivølli móti Kongsvinger. Gamla felagið hjá Juliani, sum ikki helt seg hava brúk fyri føroyska miðvallaranum, flutti í fjør niður í næstbestu deildina. Teir hava higartil staðið seg væl, so uppgávan hjá Sogndal verður torfør.

JH

Úrslit:

14.05	Aab-Vejle	7-1
14.05	Esbjerg-Herfølge	1-2
14.05	AB-Viborg	6-0
14.05	OB-Lyngby	1-3
15.05	Siolkeborg-Brøndby (leiktur eftir evstamark)	

Komandi dystir:

21.05	AGF-AB
21.05	Viborg-Aab
21.05	Herfølge-OB
21.05	Lyngby-Silkeborg
21.05	Vejle-Esbjerg

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Herfølge	30	16	-	5	-	9	47	44	3	53
2	Brøndby	29	14	-	7	-	8	53	33	20	49
3	AaB	30	12	-	12	-	6	54	31	23	48
4	AB	30	12	-	9	-	9	46	33	13	45
5	Silkeborg	29	12	-	7	-	10	44	31	13	43
6	Lyngby	30	13	-	4	-	13	49	52	-3	43
7	Viborg	30	12	-	7	-	11	42	48	-6	43
8	FCK	30	12	-	6	-	12	41	33	8	42
9	OB	30	9	-	9	-	12	34	40	-6	36
10	AGF	30	9	-	7	-	14	33	48	-15	34
11	Vejle	30	6	-	11	-	13	36	63	-27	29
12	Esbjerg	30	8	-	4	-	18	38	61	-23	28